## UTTAN ÚR HEIMI



*Fahd kongur var fyri tøttum samstarvi ímillum Saudiarabia og Vesturheimin, og hann var tí ikki væl lýddur allastaðni í tí arabiska heiminum. Á myndini hálvbróðurin Abdullah, sum hevur virkað sum kongur seinastu árini*

*Mynd: Reuters*

# Fahd kongur deyður

**Saudiarabiski kongurin doyði í gjár. Hann var ein týðandi umboðsmaður hjá Vesturheiminum í Miðeystri**

Saudiarabia
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fahd ella Fahd ibn Abd al-Aziz, sum hann æt, røkti ymisk ráðharrastørv, til hann gjørdist krúnprinsur, tá bróður hansara Faysal doyði í 1975, og tá hin bróðurin, Khalid, doyði í 1982, tók Fahd við sum kongur. Samstundis røkti hann starvið sum forsætisráðharri.

Árið fyri hann gjørdist kongur, kunngjørdi Fahd eina ætlan um, hvussu friður skuldi fáast í lag ímillum Ísrael og tey arabisku londini. Sum saudiarabiskur kongur hevði hann ein týðandi leiklut í tí arabiska heiminum. Hann virkaði alla tíðina fyri góðum viðurskiftum við USA og Vesturheimin, og tað gjørdi, at nógvir av hansara landsmonnum og aðrir arabar hildu lítið um hann. Sum kongur í Saudiarabia hevði hann kortini eina sterka støðu ímillum flestu muslimar.

Hóast hann hevur borið kongsheiti, hevur Fahd ikki virkað sum kongur tey seinastu tíggju árini. Hann fekk ein hjartatilburð í 1995, og tað gjørdi, at hann var ikki førur fyri at røkja embætið. Tí hevur hálvbróðurin Abdullah virkað sum kongur hesi árini.

Fyri tveimum mánaðum síðani varð Fahd lagdur inn á eitt sjúkrahús í Riyadh við lungnabruna, og har doyði hann í gjár. Stutt eftir kunngjørdi almenna sjónvarpið, at Abdullah hevði tikið við sum kongur. Eygleiðarar vænta, at hann fer at reka sama uttanríkispolitikk sum hálvbróðurin.

Saudiarabia er heimsins største oljuútflytaraland, og tá deyðsboðini av kongi fræ ttust, hækkaði oljuprísurin, so hann kom upp um 61 dollarar fyri tunnuna.

## Gongur væl hjá svium

Tað gongur so væl hjá teimum størstu fyritøkunum í Svøríki, og fyrra hálvár høvdu 25 tær størstu fyritøkurnar 150 milliardir krónur í avlopi, og tað er nógv meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør, skrivar Dagens Nyheter.

Eitt nú gongur tað sera væl hjá heilivágfyritøkuni Astra Zeneca. Hjá henni var avlopið teir fyrstu seks mánaðarnar í ár 25 milliardir krónur. Men eisini aðrar stórar fyritøkur so sum lastbilaverksmiðjan Volvo, telefyritøkan Ericsson, klædnafyritøkan Hennes & Mauritz og orkufyritøkan Vattenfall hava munandi størri avlop í ár enn í fjør. Fíggingarfyritøkurnar so sum bankarnir Nordea og Handelsbanken fara væntandi eisini at almannakunngera sera góð úrslit fyri fyrra hálvár, skrivar blaðið.

Svenska vinnulívið hevur framt umfatandi nýskipanir tey seinastu árini, og tað er úrslitið av teimum, sum vísir seg nú. Harumframt er sølan hjá fleiri fyritøkum vaksin nógv. Eitt nú er sølan hjá telefyritøkuni Ericsson vaksin næstan 10 milliardir krónur samanborið við fyrra hálvár í fjør.

## Býta jørðina ørvísi

Hóast tey svørtu hava tikið við politisku leiðsluni í Suðurafrika, eru tað framvegis tey hvítu, sum eiga at kalla alla landbúnaðarjørðina.

Men tað skal eisini broytast. Teir seinastu dagarnar hava fleiri hundrað umboð fyri ymsar bólkar hildið ráðstevnu í Johannesburg, har tey hava tosað um, hvussu jørðin kann býtast javnari ímillum svørt og hvít. Sum er eiga tey hvítu umleið 80 prosent av landbúnaðarjørðini, og í fleiri førum er talan um jørð, sum tey svørtu áttu, men sum bleiv tikin frá teimum, tá tann hvíti minnilutin ráddi í landinum.

Stjórnin hevur sagt, at hon ætlar sær ikki at brúka somu harðrendu framferð sum myndugleikarnir í Zimbabwe, ið hava ognartikið at kalla alla jørð hjá teimum hvítu bóndrunum. Kortini ásannar stjórnin hjá Thabo Mbeki, forseta, at neyðugt er at taka stig, sum neyvan fara at fella í góða jørð hjá øllum.

## Forsetar skulu vaskast

Fyri 65 árum síðani var listamaðurin Gutzon Borglum liðugur við ta kendu myndina av amerikonsku forsetunum George Washington, Thomas Jafferson, Abraham Lincoln og Teddy Roosevelt í Mount Rushmore, men nú verða tær vaskaðar fyri fyrstu ferð.

Arbeiðið at vaska tey fýra forsetaandlitini byrjaði fyri fjúrtan døgum síðani og verður ætlandi liðugt seinni í hesari vikuni. Menninir, sum gera arbeiðið, sleppa ikki at brúka nøkuur vaski- ella reinsievni, men bara reint vatn. Hóast andlitini ikki eru vaskaði í 65 ár, fara tey ikki at síggja stórt ørvísi út, skrivar AP.

Gutzon Borglum fór undir arbeiðið at høggja tey fýra andlitini inn í klettin í 1927, og í 1939 var hann liðugur við tað seinasta. Tað var andlitið á Teddy Roosevelt.

Havnar Bio

kall Coca-Cola




Valiant

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 02.08 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |
| Mikudag | 03.08 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |
| Hósdag | 04.08 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |




Batman begins

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 02.08 | kl. 18.15 | kl. 20.15 |
| Mikudag | 03.08 | kl. 18.15 | kl. 20.15 |
| Hósdag | 04.08 | kl. 20.30 | |




Bølle Bob

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 02.08 | kl. 16.30 |
| Mikudag | 03.08 | kl. 16.30 |




A lot like Love

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 02.08 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Mikudag | 03.08 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Hósdag | 04.08 | kl. 18.15 | |




Sin City

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 02.08 | kl. 23.00 |
| Mikudag | 03.08 | kl. 23.00 |
| Hósdag | 04.08 | kl. 23.00 |

Komandi filmar

| | |
|---|---|
| Return to sender | fríggjadagin 05.08. |
| Adams æbler | fríggjadagin 05.08. |

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu